Tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Óføriskur fótbóltur

## *Oddagrein*

Seinastu tíðina hevur rok verið í føroyska fótbóltsheiminum. Orsøkin til hetta er, at dómarabólkurin í landskappingardystinum millum KÍ og B68 fyri trimum vikum síðani gav Fótbóltssambandinum eina frágreiðing um, at annar av linjuverjunum hevði fingið eitt slag frá einum áskoðara ávegis til hálvleikssteðgin. Hetta helt dómarabólkurin átti at fáa avleiðingar fyri heimaliðið.

Síðani hevur kappingarnevndin hjá FSF viðgjørt málið, og teir góvu KÍ eina bót upp á 10.000 krónur. Hetta vóru dómararnir ikki nøgdir við, tí teir hildu, at revsingin ikki var nóg hørð. Í staðin fyri gula kortið, vildu dómararnir hava FSF at geva KÍ reyða kortið. Meirilutin av dómarunum, sum møttu á enum fundi í Havn, avgjørdu at fara í verkfall, men hetta fór nevndin í Fótbóltsdómarafelagnum síðani at arbeiða ímóti. Og tað eydnaðist nevndini at forða fyri einum verkfalli. Partur av loysnini kallaðist ein fundur við FSF um, hvussu trygdin hjá dómarum og spælarum framyvir kann betrast.

Og úrslitið av hesum fundi kom týsdagin. Nú skulu trygdarfólk ansa eftir, at dómarar og spælarar fáa frið á leiðini til og frá vøllinum. Eisini skal ein sokallaður trygdargeiri gerast frá skiftirúmunum og til vøllin. Nú skal eingin kunna klappa spælarar á herðarnar, og verður onkur tikin við labbunum í kakudósini, so er tað bara út av vaktini.

Úrslitið av fundinum millum fótbóltsdómararnar og FSF er fullkomiliga óføroyskt, og hóast vit á ongan hátt ætla at verja slíka hending, sum eftir øllum at døma fór fram til dystin í Klaksvík herfyri, so tykist nýggja stigið hjá FSF verða sum at skjóta stara við kanón. Føroyskur fótbóltur er so at siga altíð føroyskur - tað vil siga, at tað er púra óvanligt, at fólk gera seg inn á spælarar, venjarar ella dómarar - og at tað nú skal vera neyðugt við trygdarfólki og trygdargeira til fótbóltsdystir í Føroyum ljóðar fullkomiliga burturvið.

Jú, gamaní eiga tað at finnast fólk í øllum feløgum, sum eru til reiðar at traðka til, um okkurt er áfatt, og soleiðis er eisini tann dag í dag. Men at fara at skipa hesi fólk í trygdarlið (óvápnað, sum vit hava skilt), og lata tey verja ein geira frá vøllinum til skiftirúmini er líka tápuligt sum tað ljóðar. Hvussu í allari víðu verð hugsar FSF at smærru feløgini skulu mobilisera vaktarlið vikuskifti eftir vikuskifti, skipa fyri trygdargeira og annars halda teimum 50 ela 100 áskoðarunum burtur frá spælarum og dómarum? Hetta er óføroyskt, og fer fyrst og fremst at raka tey smærru feløgini. Í Havn ella í Klaksvík fer neyvan at vera nakar trupulleiki at avbyrgja eitt øki frá skiftirúmunum og til vøllin, men tað verður tað nógva aðrastaðni.

Føroysku fótbóltsdómararnir og Fótbóltssambandið áttu at sligið kalt vatn í blóðið og funnið eina meira rímuliga og føroyska loysn á trupulleikanum. At onkur idiotur hevur givið einum linjuverja eitt skump ella slag eigur ikki at gera tann fólksliga føroyska fótbóltin til ein spurning um vaktarhald og trygdargreirar. So langt eru vit ikki komin enn, at tað eigur at vera neyðugt!

So higani hava vit eitt gult kort á loftið til FSF og fótbóltsdómararnar. Tí skulu trøllvaksin vaktarfólk nú til at gera manngarð um spælararnar og halda millum annað teimum áhugaðu børnunum langt burturi frá spælarunum, ja, so er tað skjótt at onkrir áskoðarar geva føroyskum fótbólti reyða kortið.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Hvat hugsa okkara myndugleikar og politikarar fyri sær???

*Ella sova allir í tímanum???*

Havi nu fylgt hampuliga væl við, hvat hendir á politiska vígvøllinum og hvat verður gjørt fyri at menna ymisku økini kring landið vinnuliga frá politiskari síðu – tað er jú so, at politikarin skal gera karmar, sum arbeiðast skal undir, og síðan skal vinnan royna at fáa sum frægast burturúr.

Tað sær út fyri mær, sum um alt, ið eitur uppafturbygging av útjaðaranum aftan á kreppuna, er farið í gloymibókina og verður bert tikið fram aftur av hillunum sum valagn – eg vóni, at øll fólk í útjaðaranum minnast til hetta til næsta val, tí tit fáa als onki frá hesum monnum, sum umboða tykkum, uttan tómt tos og tóm lyftir.

**Fyri at koma til sjálva sakina, ið liggur mær á hjarta:**

***BIP – point (Board Inspection Point) – hvat er hetta fyri nakað???***

Henda spurning spyrja nokk fleiri av okkum, sum eru í vinnuni, um, hvat skal hetta BIP-punkt vera gott fyri???

Jú, jú, fínt skal tað vera, nú hava vit enn einaferð latið páduttað okkum 16 nýggj ES-direktiv, sum eftir ætlan skulu gera okkara støðu betri handilsliga – í ES-samanhangi. Harímillum skal setast á stovn eitt **Board Inspection Point,** og sjálvandi skal hetta BIP-punkt (stytt) verða í Havn – hvar annars? Tí her sita allir bureaukratarnir og teknokratarnir, og tað er lættast fyri teir, um hetta »checkpoint« er í Havn – **og okkara politikarar, sum umboða m.a. útjaðaran, ja, teir vakna slettis ikki.**

T.d. teir stakkals russararnir (triðja lond), sum ikki hava ráð í løtuni at fáa síni skip ES-løggildað, nú skulu teir heldur ikki fáa loyvi til at uppskipa fisk á goymslu í Føroyum ella til virkingar í Føroyum, uttan skip teirra eru ES-góðkend, *– og hetta sjálvt um vøran, sum verður uppskipað evt. í transit ella framleidd í Føroyum, kanska ikki skal til ES-marknaðin.*

*Tað sama ger seg t.d. galdandi við kongafiski úr Irmingarhavinum, sum í dag verður lagdur í transit her. Hann fer vanliga til Fjareystur.*

*Makrelur, sild og svartkjaftur, sum verður umskipaður ella lagdur upp her í transit – hesin fer heldur ikki til ES-marknaðin.*

*3. lands rækjurnar, sum vanliga verða framleiddar á rækjuvirkinum á Oyri, fara ivaleyst eisini til onnur lond enn ES-lond, tí ES tollar 3. lands rækjur við 20%.*

Eg spyrji bara: – Hvar er logikkurin, ganga tit allir við høvdinum undir arminum ella??? Hví var vinnan als ikki eftirspurd, áðrenn tit føra slíkar reglugerðir út í lívið???

Eg kundi hugsað mær, at hetta kemur at raka okkara samráðingarnevnd sum ein boomerang til næstu fiskarísamráðingar við russar, tí teir saman við okkum, sum hava goymslur og handla nógv við russar, eru teir sum verða hart raktir.

Eg kann heldur ikki lata vera við at nevna, at tann persónur, sum er aðalstjóri fyri øll BIP punkt í ES, er ongin annar enn Tom Goldman, sum í síni tíð nærum var við at avhøvda Rækjuvirkið og Fiskasøluna í smb. við 3. lands rækjur og skapti Føroyum stórar trupulleikar í ES í samband við upprunakrøv etc., – so væntið ikki, at hann fer at verða **okkara besti vinur í ES-høpi.**

Triðja lands vøra sum t.d. vanliga skal leggjast upp ella umskipast í Klaksvík, Fuglafirði, Runavík ella Vági, har størstu frystigoymslur í landinum liggja í dag, hendan vøra skal nú sambært viðtiknu ES-direktivunum, via **Board Inspection Point í *Tórshavn***, t.v.s. ***lossast í Tórshavn***!!! ella ***Kollafirði***, sum nú eisini hoyrir undir Havnina kommunalt. Grundgevingin frá Heilsufrøðiligu Starvsstovu er, at hetta er tí tað er nemmast??? – nemmast fyri hvønn, spyrji eg??? Tað má vera fyri tykkum, tí so sleppa tit frá at ferðast til tey ymsu støðini, har fiskurin/vøran skal leggjast upp ella umskipast. Um tað er besta grundgevingin fyri hesum, so sigi eg bara: takk skalt tú hava, slíkt møsn og býtt uttanumtos skal leitast leingi eftir.

Slíkum grundgevingum, sum oman fyri nevnt og teirra samtykt, sum løgtingið hevur tikið undir við í tí skapi, sum hevur verið nevnt í fjølmiðlunum, – hetta kunnu vit, sum hava plaserað okkara virkir í útjaðaranum, als ikki liva við, **tí tit koma at týna okkum, um tit gjøgnumføra hetta.** Og hvat gera politikararnir? Tiga – her er fullkomin tøgn. – Ein kann væl tilláta sær at spyrja hví tiga tit???



Og so tosa tit um at gera Føroyar til tilfeingismiðdepil í Norðuratlantshavi – Vorherre bevares.

Tað hevði ikki verið annað enn rímuligt, at hetta ES-(BIP) krav einans var galdandi fyri vøru, sum skuldi framleiðast her í landinum og sum skal inn til ES???

Hvat rakar tað ES, hvør vøra skal til onnur lond enn til teir.

Í Danmark og Onglandi hevur ES gjørt undantøk, soleiðis at um vøra skal framleiðast frá skipi, sum ikki er ES-góðkent, so er treytin tann, at góðskuleiðarin á framleiðandi virki skal siga gott fyri, at vøran, sum er komin frá hesum skipum, er í lagi, og so eru dyrnar opnar, eisini inn í ES.

Hví kann hetta ikki eisini vera galdandi fyri tey føroysku virkini, sum liva av russarafiski í teirra framleiðslu??? Er tað frægari at lata fiskin fara til Kina at framleiða og síðani koma inn í ES gjøgnum bakdyrnar??? Tað er nevniliga tað, sum fer at henda, og norðmenn hava gjørt var við hetta í grein í Fiskaren fyri stuttum.

Noreg og Ísland ætla sær, sum eg skilji ikki at eftirlíka at arbeiða eftir hesum hørðum BIP krøvum.

Eg kann ikki hugsa mær, at Fiskavirking hevur ráð at lata Bacalao aftur og senda 150 fólk til hús pr. 01.02.2001. Hvat siga ánararnir og fakfeløg til hetta, og hvat við NORFRA og NORÐURFISK o.ø.???

Skulu 1-3 starvsfólk innan tað almenna sigast úr starvi er ramaskríggj at hoyra, men hvør hugsar um tey tímaløntu úti í fríu vinnuni??? Í míni verð eru tey líka nógv verd sum tey alment fastløntu, men tað verður lítið tosað, tá hesi fáa uppsøgnina í hondina.

Eg haldi, tað er uppá tíðina, at vinnan slær nevan í borðið og markerar seg yvir fyri hesum monnum, sum als ikki tóku vinnuna upp á ráð ella spurdu um avleiðingarnar av teirra handlingum.

***Tit, sum hava politiskt vald og kunnu broyta/rætta tiknar avgerðir, vaknið,tí tit eru tiknir á bóli.***

Vágur 06.06.2000
**Johan Dahl**

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt vístu samkenslu, tá ið kæri pápi, verpápi og abbi okkara

**Tórur Sjóføddi av Vollanum**
**Saltangará**

brádliga doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri talur í kapellinum og í Berøa, til organist og solosangarar. Takk fyri uppringingar, heilsanir, blómur og kransar. Og tykkum, sum fylgdu honum til hansara síðsta hvíldarstað. Eina hjartans tøkk til tykkum, ið hjálptu til við ervinum.

**Børnini v/ familju og Nicolina**



# Klokkari og organistur bera seg undan tænastu í Christianskirkjuni

*Klokkarin og organisturin í Christianskirkjuni hava boðað frá, at teir gera ikki tænastu í kirkjuni annan hvítusunnudag av tí, at karsten Nissen, biskupur í Viborg skal prædika hendan dag. Hans Jacob Joensen, biskupur, sigur, at so fara tey bara at fáa onkran annan at ringja og spæla*



*Klokkarin og organisturin hava norið seg undan tænastu í Christianskirkjuni annan hvtusunnudag*

EDVARD JOENSEN

Klokkarin og organisturin í Christianskirkjuni hava boðað frá, at tað verða ikki teir, sum ringja og spæla í kirkjuni annan hvítusunnudag.

Grundgevingin skal vera sambært øðrum keldum, Tíðindablaðið sosialurin hevur tosað við - at teir vilja ikki gera tænastu saman við biskupinum í Viborg, Karsten Nissen, sum Føroya biskupur hevur givið loyvi at prædika í kirkjuni, hóast prestarnir og meiriluti í kirkjuráðnum noktaðu fyri at lata honum kirkjuna.

Frá álítandi keldum í Klaksvík hevur Tíðindablaðið Sosialurin fingið váttað, at teir báðir, sum annars hava gjørt tænastu í kirkjuni í nógv Harrans ár, hava boðað frá, at teir ynskja seg frítiknar fyri tænastu hendan dagin.

Sjálvir siga teir seg onga viðmerking at hava til málið.

Teir vilja als ikki úttala seg, søgdu báðir, tá Sosialurin spurdi teir um grundina til hesa avgerðina.

Heldur ikki formaðurin í kirkjuráðnum segði seg hava nakra viðmerking til málið yvirhøvur.

At tveir av kirkjutænarunum ikki vera í kirkjuni hendan dagin, sær Hans Jacob Joensen, biskupur, ikki sum nakran trupulleika.

Hann væntar ikki, at tað fer at standa á at fáa onkran annan at ringja og spæla. Tað hevur verið vanligt, tá onkrum hevur borist frá, sum annars plagar at gera tænastu í kirkjuni.

Tað vanliga plagar í slíkum førum at vera, at kirkjuráðið so heitir á onkran avloysara. Men tað hevur ikki borið til at fingið at vita frá kirkjuráðnum, um so verður.

Keldur, Tíðindablaðið Sosialurin hevur tosað við, meta, at tað helst verður biskupur, sum má finna onkran, sum kann taka hesi bæði størvini upp á seg hendan dagin.

Hans Jacob Joensen, biskupur, sigur, at hann hevur onga grundgeving fingið fyri, hví hesir báðir kirkjutænararnir hava borið seg undan hendan dagin.

Men er tað orsakað av persónligari sannføring, at teir ikki vilja gera tænastu saman við manni, teimum ikki dámar, er tað teirra fulli rættur at gera so. Tað fara kirkjumyndugleikarnir ikki at blanda seg uppí, sigur biskupur.

# Ongar fyrireikingar

*Á Kirkju gera stey einki serligt burturúr, at tey fáa drotningavitjan annan hvítusunnudag. Tað hava tey ikki havt tíð til, tí fráboðanin um vitjanina kom so seint*



*Á Kirkju*

EDVARD JOENSEN

Nú Margretha drotning vitjar í Føroyum í samband við 1.000 ára haldið hjá kirkjuni, fer hon eftir ætlan í kirkju á Kirkju útií Fugloy.

Kirkjufólk halda tað sjálvandi vera spennandi við eini drotningavitjan. Tað er tað altíð.

Men ongar stórvegis fyrireikingar soleiðis eru gjørdar í bygdini í hesum sambandi, sigur Laura Lydersen á Kirkju, sum Sosialurin tosaði við í gjár.

Hon sigur, at fráboðanin um drotningavitjanina kom so mikið seint, at tey hava ikki havt stundir at gera nakað stórvegis burturúr.

Eitt sindur av kommunalum arbeiði hevur verið á Kirkju. Kaðalarbeiði og tílíkt, sum kravdi, at grivið var í vegnum. Hetta er slættað aftur, mest fyri at eingin skal detta oman soleiðis.

Men annars gongur lívið sína heilt vanligu gongd úti í Fugloy.

Tey vænta, at tað verður væl av fólki í oynni um hvítusunnuna. Men tað er tað á hvørjum ári, so heldur ikki tað er nakað, sum er ávirkað av drotningavitjan.

Laura Lydersen heldur tó, at stuttligari hevði verið, um tey fingu fráboðan í góðari tíð, so tey kundu fyrireika seg og víst drotningini og fylgi hennara runt í oynni.

Tí har er vakurt og nógv at síggja, sigur hon. Men nú verður tað bara ein heilt stutt vitjan, har drotningin kemur við tyrlu, fær ein kaffimunn og fer í kirkju. Síðan verður farið avstað aftur beinanveg.

Hóast tað er í yvirflóð av útlendskum biskupum og øðrum »gejstligum« í landinum júst hesar dagarnar, verður tað ein vanlig bygdarguðstænasta við deknalestri, sum drotningin fer til annan hvítusunnudag. Tað verður fyrrverandi lærarin, Hans David Matras, sum fer at lesa lestur í kirkjuni á Kirkju.

Men veðrið kann vera lumpið í Føroyum, so um tað ikki viðrar at fara til Fugloyar, verður í staðin farið í kirkju í Kollafirði, har eisini deknaguðstænasta er hendan dagin.

Um so verður, verður tað Niclas Joensen, deknur, sum fer at lesa fyri drotningini.

**FRAMSÝNING**
**í Smiðjuni í Lítluvík**

við Helga Joensen og Anker Eli Petersen

| | |
|---|---|
| Sunnudag 4. juni | kl. 14.00 - 20.00 |
| Mánad. 5. - leygard. 10. juni | kl. 11.00 - 20.00 |
| Sunnudag 11. juni | kl. 14.00 - 20.00 |




SANSIR TEL 355 355

SMS · Tel. 353535 · Fax 353536
E-mail: tryarin@post.olivant.fo